umhvørvisstovan

TÓRSHAVNAR HAVN
EYSTARA BRYGGJA
POSTBOX 103
110 TÓRSHAVN

Argir hin 26. november 2015
Málsnr.: 13/00317-41
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Góðkenning av árinsmeting**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið umhvørvisárinsmeting fyri útbygging av eystara havnarøki í Tórshavn. Góðkenningin hevur heimild í § 21, stk. 1 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum[1].

## 1. Heimild og grundarlag

Sambært § 21 í havumhvørvislógini kunnu verkætlanir á sjónum og fram við strondini, sum hava týðandi ávirkan á náttúru og umhvørvi, ikki verða framdar uttan góðkenning frá Umhvørvisstovuni. Áðrenn slík góðkenning verður veitt, skal verða mett um avleiðingarnar, sum verkætlanin hevur á náttúru og umhvørvi.

Í viðgerðini hevur Umhvørvisstovan einans lagt dent á ávirkan á náttúru og umhvørvi so sum plantu- og djóralív og ávirkan av dálking, óljóði o.ø.

Sostatt eru atlit til fornminni, ferðsluviðurskifti, útsjónd og eitt nú útsýni ikki partur av viðgerðina.



## 2. Lýsing av málinum

Tórshavnar kommuna og Tórshavnar havn hava ætlan um at útbyggja eystara havnarøki við uml. 110.000 m$^2$ og eini atløgusíðu upp á uml. 870 m. Gjørd verður eitt nýtt bryggjuøki eystan fyri verandi bryggjuøki. Sunnanvert Skansan, norðan fyri verandi bryggjuøki, verður gjørt eitt uml. 350 m langt og 100 m breitt øki við verjugarði í ein landsynning, og haðani eitt uml. 750 m langt uml. 150 metra breitt øki við verjugarði í ein útsynning. Harafturat verður verandi bryggjuøki breiðkað við uml. uml. 50 m og longt góðar 60 m við atløgubryggju á báðum síðum.

Upprunaliga var ætlanin at útbyggja havnarøkið við uml.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, við seinni broytingum.

163.000 $m^2$ og atløgubryggjuna við 700 m, bæði norður- og suðureftir. Norðan fyri Havnarskrivstovuna millum land og havnarlag skuldi vera bátahylur, og norðan fyri bátahylin nýggj brúgv til tunga ferðslu frá havnarlagnum til vegin yviri við Strond. Hendan ætlanin er broytt, soleiðis at norðari parturin av útbyggingini er sleptur.

Í umhvørvisárinsmetingini, sum Tórshavnar havn hevur latið gera, verður greitt frá, at verandi umstøður hjá Tórshavnar havn ikki eru nøktandi. Tørvur er á at kunna taka ímóti bæði fleiri og størri skipum, eins og tørvur er á meiri plássi til bingjur o.a. Størri skip enn tey sum nú koma, kunnu ikki leggja at í verandi havn.

## 3. Umsókn og málsviðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 20. juni 2013 uppskot til arbeiðsætlan fyri umhvørvisárinsmeting fyri upprunaligu ætlanina at útbyggja Tórshavnar havn til góðkenningar. Umhvørvisstovan góðkendi arbeiðsætlanina við ávísum viðmerkingum hin 26. juli 2013.

Hin 23. mai 2014 fekk Umhvørvisstovan uppskot til árinsmeting til viðmerkingar, og vórðu viðmerkingar sendar Tórshavnar havn hin 2. juni 2014.

Endalig árinsmeting varð latin Umhvørvisstovuni hin 26. juni 2014.

Hin 21. oktober 2015 fekk Umhvørvisstovan fráboðan um, at ætlanin var broytt við tilhoyrandi tekningum og ískoyti til árinsmetingina við nýggjum metingum av óljóði o.ø.

### 3.1 Hoyring

Umhvørvisárinsmetingin varð send til almenna hoyring við lýsing í bløðunum hin 9. juli 2014 og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, eins og hon varð send ávísum almennum stovnum. Umhvørvisstovan fekk seks hoyringarsvar, sum vórðu send Tórshavnar havn til viðmerkingar. Síðani hevur Umhvørvisstovan havt bæði skrivligt og munnligt samskifti við Tórshavnar havn um innihaldið í árinsmetingini. Serliga ynskti Umhvørvisstovan eina lýsing av umhvørvinum í sjónum og á havbotninum, har ætlaða útbyggingin skal gerast.

Hin 4. mai 2015 fekk Umhvørvisstovan hvítbók við viðmerkingum til hoyringarsvar og aðrar viðmerkingar til árinsmetingina. Eisini innihelt hvítbókin ískoyti til árinsmetingina við lýsing av umhvørvinum á staðnum og eina meting av ávirkan av ætlanini, gjørda av Biofar og Søvnum landsins.

### 3.2 Umhvørvisárinsmeting

Umhvørvisárinsmetingin lýsir ætlaðu havnarútbyggingina, og hvørjar avleiðingar hon hevur fyri náttúru og umhvørvi eins og ferðslu og onnur viðurskifti, bæði í byggitíðini eftir at byggingin er liðug. Árinsmetingin er gjørd av ráðgevandi fyritøkuni Rambøll í Danmark.

Umhvørvisárinsmetingin er gjørd til upprunaligu ætlanina. Men av tí, at partar av ætlaðu útbyggingini eru tiknir úr verkætlanini, metir Umhvørvisstovan, at allir partar av broyttu ætlanini eru fevndir av árinsmetingini við ískoyti.

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

### 3.2.1 Umhvørvisampar

Økta virksemið við fleiri og størri skipum hevur meiri ferðslu á landi við sær, bæði á sjálvum havnarøkinum og til og frá økinum. Hetta fer at hava við sær nakað av øktum óljóði í ávísum pørtum av býnum.

Gjørdar eru útrokningar, ið byggja á ringast hugsandi støðuna, har trý stór bingjuskip, umframt Norrøna og Smyril, liggja við bryggju samstundis. Hesar vísa, at hóast óljóðið hækkar nakað, verður ikki farið upp um vegleiðandi markvirðini fyri óljóð í íbúðarøkjum.

Í byggitíðini verður roknað við munandi óljóði frá lastbilum, gravimaskinum, dumparum, kompressarum o.ø. Sambært útrokningum verður óljóðið tó ikki oman fyri vegleiðandi markvirðið fyri byggiarbeiði. Larmandi virksemi verður í dagtímunum.

Fleiri skip og økt ferðsla fer eisini at hava við sær ávísan vøkstur í luftdálking frá bæði skipum og ferðslu á landi. Tó verður ikki mett, at luftgóðskan á og nærhendis havnarøkinum verður munandi ávirkað av hesum.

### 3.2.2 Ávirkan á djóra- og plantulív

Í árinsmetingini er kanning av djóra- og plantulívinum á sjónum og á botni á økinum, sum verður fevnt av ætlaðu útbyggingini. Eisini verður mett um, hvørja ávirkan ætlaða útbyggingin fer at hava á djóra- og plantulív. Tey sløg, sum eru umrødd eru plantur, skónir, fuglur, tarar, ryggleys djór, kópur, hvalur og fiskur. Hesin partur er gjørdur av Biofar og Søvnum landsins.

Niðurstøðan er, at at økið, sum verður ávirkað av stóru útbyggingini er vanligt búlendisslag í Føroyum. Einki sermerkt varð funnið, ið ikki finst aðrastaðni í Føroyum. Ávirkanin á djóra- og plantulívið er sera avmarkað og bara í nærumhvørvinum.

### 3.2.3 Spillivatnsútleiðingar

Verður ætlaða havnarútbyggingin framd, fara nakrar av verandi spillivatnsútleiðingunum hjá Tórshavnar kommunu at vera innan fyri komandi molar/bryggjur.

Sambært kunngerð um spillivatn[2] skal spillivatn leiðast út á sjógv, har rákið førir spillivatnið frá landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum. Spillivatn skal ikki leiðast á sjógv innan fyri molar o.t. Kommunalar spillivatnsútleiðingar skulu góðkennast av Umhvørvisstovuni.

Umhvørvisstovan metir, at útleiðingin á sjálvum havnarlagnum (UA 12) og útleiðingarnar við Landssjúkrahúsið (UA 17 og UA 18) skulu leingjast út um komandi bryggju/mola fyri at lúka treytirnar í kunngerðini um spillivatn. Møguliga er tað eisini galdandi fyri útleiðingina við Sersjantavíkina (UA 11).

[2] Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

## 4. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá Tórshavnar havn frá juni 2014, ískoytið í hvítbók frá apríl 2015 og ískoyti við nýggjum útrokningum av óljóði frá 21. oktober 2015.

Treytin fyri góðkenning er, at verkætlanin verður framd, sum greitt er frá í umsóknartilfarinum og fráboðanini um broyttu verkætlanina. Verður ætlanin broytt á ein hátt, sum ávirkar umhvørvisviðurskiftini til tað verra, eitt nú við øktum óljóði, størri útláti av dálkandi evnum o.a., krevst nýggj góðkenning.

Harumframt eru hesar treytir:

- Spillivatnsútleiðingar, sum verða innan fyri nýggju bryggjuna/molan, skulu leggjast um, soleiðis at tær lúka treytirnar í kunngerðini um spillivatn fyri at verða góðkendar eftir ætlaðu útbyggingina,
- Larmandi virksemi í byggitíðini skal, sum meginregla, fara fram í vanligari arbeiðstíð.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

## 5. Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar.

## 6. Kæra

Henda avgerð kann kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til Heilsu- og innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. desember 2015.

Suni Petersen, deildarleiðari

Ingvard Fjallstein, umhvørvisviðgeri

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf. +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo